# ENDAMÁL VIÐ FØRLEIKASTOVUM

Grundað á tilmæli um serundirvísing

# Førleikastovan

- Førleikastovan umboðar eina menniskjafatan og ein hátt at síggja læru, har støði verður tikið í førleikunum hjá næmingunum og menningarmøguleikum teirra
- Læra verður hugsað breitt, har yvirskipaða uppgávan fevnir um javnt og samt at bera saman allar næmingar skúlans í mun til háttin, sum valdur er at innrætta og skipa undirvísingina á staðnum
- Førleikastovan skal - samstundis sum hon er ein praktisk fyriskipan - vera eitt grundanarrúm, har samlaða skúlaskipanin á staðnum hugsar inn tørvin hjá øllum næmingunum
- Málið hjá Førleikastovuni er tí bæði ein hóskandi skipan av skúlans virksemi í mun til á bestan hátt at rúma øllum næmingum og at tryggja, at næmingar við serligum tørvi fáa eitt viðkomandi og skikkað undirvísingartilboð

# Førleikastovan

- Førleikastovan er skúlans innanhýsis vitanarmiðdepil. Samrøðan millum ymsu fakbólkarnar er av sera stórum týdningi, tí hon verður mett at smitta  gagnliga av, so vit fáa samvirkandi fyrimunir
- Samspælið millum Førleikastovuna og restina av skúlanum fevnir um ráðgeving og hugskotsgeving til einstaka læraratoymið, einstaka læraran ella stuðulin í teirra námsfrøðiliga arbeiði við ymsu tørvunum hjá næmingunum
- Førleikastovan vil samstundis - við skúlaleiðaranum á odda - alla tíðina samskifta við tænastueindirnar/Sernám um teirra leiklut í mun til skúlans námsfrøðiligu og skipanarligu menning
- Førleikastovan er tí krumtappurin í stovnsetingini av einum rúmligari fólkaskúla

karolinam@setur.fo

# Uppgávan hjá Førleikastovuni

- Stuðla lærarum at náa endamálinum fyri undirvísingina, bæði á normal- og serøkinum
  - ✓Við normaløkið verður hugsað um ta vanligu undirvísingina
  - ✓Serøkið eru teir næmingar, ið hava tørv á tímum vegna serligan tørv
  - ✓Miðfirraðu tímarnir skulu brúkast á normaløkinum til næmingar, ið hava eitt sindur tungt við at læra

karolinam@setur.fo

# Uppgávan hjá Førleikastovuni

- Førleikastovan kom ístaðin fyri táverandi sertoymið
- Førleikastovan skal hjálpa læraranum at gera eina virkisætlan fyri átøk til einstaka næmingin og allan flokkin, har tørvur og avbjóðingar eru lyklaorð fyri framhaldandi menning
- Fólk við serkunnleika skulu manna førleikastovurnar
- Hesi skulu stuðla lærarum í inklusión av næmingum

karolinam@setur.fo

# Uppgávan hjá Førleikastovuni

- Førleikastovurnar skulu samstarva við lærugreinatoymini
- Førleikastovurnar skulu m.a. stuðla lærarum í næmingalagaðari undirvísing
- Førleikastovurnar skulu í dagliga arbeiðinum í skúlum og á stovnum saman við leiðsluni tryggja, at hjálp og ráðgeving er tøk og beinanvegin kann verða veitt

# Førleikastovan

- Manningin í Førleikastovuni er serlærari, sum er formaður, lesivegleiðari, sum er skrivari, AKT-lærari, orðblindalærari, SI lærari, málvegleiðari og støddfrøðivegleiðari

- Starvsfólkini skulu fáa tímar í virksemisætlanina samsvarandi ábyrgdarøkinum

- Tilknýtt eru skúlaheilsufrøðingur og  SSP toymið.

# Førleikastovan

- Væleydnað inklusión krevur, at lærarar & námsfrøðiligir stuðlar hava eina førleikastovu at venda sær til, har vitan verður uppbygd í tøttum samstarvi við tænastueindirnar/Sernám, og har verandi vitan verður gagnnýtt at menna gott læruumhvørvi og námsfrøðilig amboð

- Har starvast lesivegleiðarar, serlærarar og AKT-lærarar undir skúlans leiðslu í tøttum sambandi við aðrar fakbólkar á skúlanum, t.d. bókavørð og KT-vørð

- Arbeiðstíðin skal koma afturat tí, sum frammanundan var játtað til sernámsfrøðiligt arbeiði

# Endamálið var:

- at seta á stovn og grundfesta førleikastovur í skúlum/á stovnum av hóskandi stødd, har viðkomandi námsfrøðiligir førleikar verða grundlagdir og mentir

- at menna arbeiðsætlanir fyri stovuna, har eisini námsfrøðilig ráðgeving fæst frá tænastueindunum/Sernámi, og har hugskot fáast til námsfrøðiliga arbeiðið

- at kunna um úrslit av tí, sum arbeitt verður við, og sum verður latið øllum teimum, sum hava tørv á tí

- at seta í verk arbeiði við fyribyrgjandi serundirvísing

# Ábøtur

- Henda “eftirmeting” kemur so tíðliga, tí fólk ikki vóru nóg væl fyrireikað, áðrenn farið var í gongd
- Bøta um tað, sum er farið í gongd, og hjálpa teimum, sum fara í gongd komandi skúlaár
- Kunngerðir til allar serútbúgvingar mugu gerast, og onnur førleikaøki mugu fáa greiðar arbeiðssetningar
- Týdningarmikið, at fólk fáa nóg mikið av tíð  at røkja sínar uppgávur
- Hvussu røkja vit smærru eindirnar?

# Samanumtikið

- Skúlaleiðarar hava ábyrgdina av øllum virksemi í skúlunum, eisini Førleikastovuni
- Førleikastovurnar skulu - umframt at stuðla lærarum í at hækka støðið í normalundirvísingini - vera ein uppraðfesting av arbeiðinum við sernámsfrøðiliga heildarspurninginum í skúlunum og á stovnunum
- Tað er sera týdningarmikið, at arbeitt verður fyribyrgjandi á stovnunum, og at góður samanhangur er frá smábarnaaldri til skúlaaldur og víðari í skúlaskipanini
- Hetta tilboð skal koma afturat tænastueindunum, sum eiga at vera ein týdningarmikil samstarvspartur hjá førleikastovunum, tá ið teirra serkunnleiki har ikki røkkur

# Samanumtikið

- Sernám eigur at vera útgreiningarmiðstøð, har útgreiningar verða gjørdar skjótt og væl, so týdningarmiklu skúlaárini, har grundarlagið fyri víðari læring verður lagt, ikki fara við at bíða eftir hjálp
- Sernám eigur at fáa tænastueindir at virka um alt landið. Talan eigur sostatt at vera um eina trítrins rakett, har fyrsta fyribyrgjandi arbeiðið, uppfylging og fyrsta hjálpin í mun til barnið, foreldur og lærarar, verður veitt úti í førleikastovunum
- Tænastueindirnar skulu eisini arbeiða fyribyrgjandi og superviserandi í skúlum og á stovnum, men tær hava starvsfólk, t.d. sálarfrøðing, talilærara og ráðgevar, ið kunnu arbeiða við meira serligum spurningum. Tá ið talan er um meira samansettar spurningar, eigur Sernám at koma inn við sínum serfrøðingum á øllum økjum, t.d. mál- og lesiserfrøðingi, so næmingarnir við tyngstu trupulleikunum beinanvegin kunnu fáa ta hjálp, teimum tørvar

# Samanumtikið

- Endamálið við at skipa førleikastovur, sum fólk við góðum fakligum førleikum manna í øllum skúlum í hóskandi støðd, er sostatt at stytta um bíðitíðina, so næmingarnir fáa skjóta og góða hjálp beinanvegin
- Teir smærru skúlarnir fáa hesa tænastu frá størru skúlaeindunum. Á henda hátt ber til at veita øllum skúlum hjálp til ta vanligu serundirvísingina. Neyðugt er at útvega skúlunum tímar til serlærararnar, sum skulu leiða førleikastovurnar og veita serkøna hjálp í skúlunum
- Uppgávur, ið krevja meira servitan, verða loystar í samstarvi við tænastueindirnar og Sernám. Sernám eigur at menna eitt serlið av serútbúnum og royndum lærarum, sum skúlarnir kunnu boðsenda at koma út at arbeiða í flokkunum, tá ið tørvur er á serligari hjálp

# Spurnarkanning

## *Manning og skipan*

- Størru skúlarnir fylgja viðmælta leistinum frá MMR við góðum úrslitum
- Smærru skúlarnir hava ikki førleikarnar á staðnum og halda, at tað er trupult, at fólk koma uttanífrá

# Tá Førleikastovan eydnast

- Skjótari hjálp
- Arbeiðið er betur skipað
- Nærri brúkarunum
- Leiklutirnir hjá serkunnleikanum eru útgreinaðir
- Førleikastovan hjálpir til, tá ið trupulleikar eru
- Veitir ráðgeving at skipa næmingalagaða undirvísing
- Veitir beinleiðis hjálp inni í flokkunum
- Hjálpir til í samskiftinum við m.a. foreldur og stovnar
- Ein sparringspartnari hjá leiðsluni

# Førleikastovan í mun til Sernám

- Tættari og skjótari samskifti
- Bert ein 'instansur'
- Viðger mál, ið annars vóru farin beinleiðis til Sernám
- Bert tung mál fara víðari
- Førleikastovan arbeiðir við øllum málum, eisini teimum, sum eru tilmeldað Sernám, tí er vitanin stór, tá Sernám kemur inn í myndina
- Hjálpir lærarum at greina trupulleikar hjá næmingum
- Hjálpir lærarum at gera eina læriætlan fyri næmingar

# Uppskot um ábøtur

- at taka atlit til næmingar og lærarar, tá fundast skal
- at manningin hevur fakligan førleika
- at allýsa leiklutirnar
- at allýsa uppgávurnar í Førleikastovuni
- at Førleikastovan umsitur miðfirraðu tímarnar og tímarnar vegna serligan tørv
- at nøktandi tíð verður sett av til øll, sum manna Førleikastovuna
- at fáa eina FirstClass stevnu til vitanardeiling (hon er komin)

# Uppskot um ábøtur ... framhald

- at fáa fleiri tímar til manningina á førleikastovuni
- at fáa serlærararnar við eldru útbúgvingunum við
- at AKT-lærararnir fáa eina útbúgving
- at fáa støddfrøðisvegleiðarar
- at fáa eitt skipað fyribyrgingararbeiði
- at fáa lesi- og rokniskeið

# Uppskot um ábøtur … framhald

- at fáa eftirmetingarskjal, ið fylgir næminginum, tá hesin fer í annan skúla/deild
- at hava næmingasamrøðublað
- at hava greiðar mannagongdir viðvíkjandi tagnarskyldu
- ikki bert at ráðgeva, men at fara inn í stovurnar við ítøkiligum átøkum!
- Hugskot úr Tofta skúla (tilmeldingarskjal til Førleikastovuna og næmingaundirvísingaætlan